B68-B36 3-2 (1-0):

# B68 vil hava metal

**B68 fekk loksins gongd á, tá tær vunnu heimadystin á B36, og nú lukta tær av Toftum av álvara heiðursmerkji**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

B36 mundi neyvan hugsa um teoretiska møguleikan fyri FM, tá tær fóru inn á Toftir mikukvøldið. Til tess var munurin til KÍ alt ov stórur. Við einum sigri kundi B36 tó mest sum staðfesta støðuna sum silvurvinnari, men tann spenningurin er so ikki endaliga avgreiddur, nú tað endiliga eydnaðist B68 at fáa glið á spælið, sum ikki hevur hingið so væl saman eftir summarsteðgin.

### Vóru betri

B68 varð undan kappingini mett sum eitt av teimum liðum, sum fór at leggja seg út í oddastríðið, og undan summarsteðginum var eisini líkt til, at hetta fór at halda.

Í endaspælinum hava tær tó havt trupult við at liva upp til hetta, men mikukvøldið staðfestu tær so, at tær eiga at roknast upp í oddin. Heimaliðið var greitt oman á frá fyrstu løtu., Kanska skaptu tær ikki so nógvar møguleikar, men trýstið var støðugt, og tá Hansy Davidsen á hálva tímanum kundi skora eftir horna, var tað ikki meira enn B68 hevði uppiborið.

Í seinna hálvleiki helt B68 á við at trýsta, men tað skuldi tó eitt av teimum meira sjáldsomu málunum til, áðrenn tær fingu økt um leiðsluna. Týskvøldið dystaðust bestu mansliðini hjá B68 og B36, tá Julian Johnsson skeyt eitt heldur løgið mál av miðjum vølli, og hesa ferð var tað so Maibritt Olsen, sum onkursvegna kundi kundi siga takk fyri seinast. Av miðjum vølli sendi hon bóltin frameftir. Bólturin støkk í vøllin og upp um málverjan, og so var 2-0.

Alt tóktist avgjørt, tá Ann Mari Kruse lítla løtu seinni sendi hornaspark beinleiðis í netið, men so var tað at B36 gjørdi ein vørr. Fyrst var Arnbjørg Danielsen trygg úr 11 metrum, tá Laila Enghamar varð feld í brotsteiginum, og lítla løtu seinni var Arnbjørg aftur á staðnum, tá hon eftir aftur og fram í brotsteiginum smekkaði til. Seianstu løtuna av dystinum royndi B36 at trýsta seg til javnleikin, men tað mundi tó vera heilt uppiborið, at stigini vórðu verandi á Toftum.

Við sigrinum fekk B68 aftur lagt seg út í heiðursmerkjastríðið, har tær nú eru ájvanar HB í stigum. B36 er framvegis á einum tryggum øðrum plássi, og hóast tapið er lítið at ivast í, at silvurmerkini aftur í ár fara til Havnar.

**B68-B36 3-2 (1-0):**
1-0: Hansy Davidsen
2-0: Maibritt Olsen
3-0: Ann.-Mari Kruse
3-1: Arnbjørg Danielsen (br.)
3-2: Arnbjørg Danielsen

## Dystir um vikuskiftið

**Landslisðfótbóltur**

| | | |
|---|---|---|
| 07.09 | Føroyar-Skotland | |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 08.09 | NSÍ-B71 | Rúni Gaardbo |
| 08.09 | HB-B36 | Suni Johansen |
| 08.09 | VB-Sumba | Hans F. Hansen |
| 08.09 | KÍ-ÍF | Oddmar Andreasen |
| 08.09 | FSV-LÍF | Dagfinn Olsen |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 08.09 | AB-GÍ | Georg Rasmussen |
| 08.09 | TB-HB | Poul Erik JAcobsen |
| 08.09 | B68-Royn | Jan Gardar |
| 08.09 | B71-FSV | Jóhann Krog |
| 08.09 | B36-ÍF | Ólavur Weihe |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 08.09 | B68-HB | Tummas Pauli Olsen |
| 08.09 | KÍ-Skjála | Dia Lamhauge |
| 08.09 | B36-GÍ | Hans Eivind Olsen |

## 2. deild menn

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FS V | 14 | 10 - 3 - 1 | 45 | 9 | 36 | 33 |
| 2 | B36 | 14 | 6 - 4 - 4 | 22 | 22 | 0 | 22 |
| 3 | Sumba | 14 | 6 - 3 - 5 | 21 | 25 | -4 | 21 |
| 4 | B71 | 14 | 5 - 4 - 5 | 24 | 16 | 8 | 19 |
| 5 | KÍ | 14 | 5 - 4 - 5 | 21 | 22 | -1 | 19 |
| 6 | ÍF | 14 | 5 - 3 - 6 | 31 | 29 | 2 | 18 |
| 7 | LÍF | 14 | 5 - 3 - 6 | 24 | 24 | 0 | 18 |
| 8 | NSÍ | 14 | 5 - 1 - 8 | 13 | 27 | -14 | 16 |
| 9 | VB | 14 | 5 - 1 - 8 | 17 | 39 | -22 | 16 |
| 10 | HB | 14 | 4 - 2 - 8 | 20 | 25 | -5 | 14 |

## 1. deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 7 | 7 - 0 - 0 | 38 | 6 | 32 | 24 |
| 2 | B36 | 7 | 4 - 0 - 3 | 15 | 14 | 1 | 14 |
| 3 | HB | 6 | 2 - 1 - 3 | 14 | 12 | 2 | 7 |
| 4 | B68 | 5 | 2 - 0 - 3 | 10 | 12 | -2 | 7 |
| 5 | GÍ | 5 | 2 - 0 - 3 | 6 | 20 | -14 | 6 |
| 6 | Skála | 6 | 0 - 1 - 5 | 9 | 28 | -19 | 1 |

## Máltindurin, kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| Rannvá Andreasen | KÍ | 15 |
| Malena Josephsen | KÍ | 9 |
| Arnbjørg Danielsen | B36 | 5 |
| Elsa Maria Simonsen | KÍ | 5 |
| Vivian Bjartalíð | Kí | 5 |
| Heidi Heinesen | GÍ | 4 |
| Eyðfríð Kristiansen | HB | 4 |
| Anja Weihe | B36 | 3 |
| Ása á Neystabø | B36 | 3 |
| Hansy Davidsen | B68 | 3 |
| Elin Jacobsen | Skála | 3 |
| Mara Vang | B36 | 2 |
| Majbritt Olsen | B68 | 2 |
| Eyðvør úr Dímun | HB | 2 |
| Malan á Dunga | HB | 2 |
| Vivian Unadóttir | HB | 2 |
| Jensa Sirdal | Kí | 2 |
| Anna Berg Danielsen | Skála | 2 |

GÍ-KÍ 0-3 (0-2):

# KÍ er meistari

**Sum vant greiddu klaksvíkskvinnurar sína skyldu, og tá B36 so snávaði á Toftum, kundi meistaraheitið staðfestast í í fjórð-seinasta umfarinum**

FOTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

KÍ hevur í serflokki verið besta liðið í føroyskum kvinnufótbólti í ár, og mikukvødlið kundu tær so staðfesta, at lønin fyri hetta er triðja meistaraheitið á rað.

Tað var annars ikki væntandi, at staðfestingin fór at koma fyrr enn sunnudagin komandi, tá KÍ á heimavølli tekru ímóti Skála, men tá B36 nú snávaði á Toftum, so søgdu klaksvíksgenturnar ikki neitakk.

Fyri stuttum var GÍ fyri rættiligum avsmurningi, tá tær í Klaksvík lótu 13 mál fara ígjøgnum, men so galið gekk tað hóast alt ikki hesaferð.

KÍ var tó alla tíðina betra liðið, og tað var ongan tíð ivi um, hvønn veg dysturin fór at koppa. Fyrri hálvleikur var hálvrunnin, tá Elsa Maria Simonsen fekk hol á eftir horna, og tá so GÍ-verjuleikari varð rikin av vølli fyri at nýta hondina, tóktist eitt skrædl vera í vantu. Rannvá Andreasen – sum aftur hevur beina kós móti gylta stylvanum – skoraði trygt, men eftir hetta dovnaði spælið tó nakað.

Talan gjørdist sostatt ikki um nakra endurtøku av sorlinum í Klaksvík, men KÍ kundi tó staðfesta sigurin, tá Rannvá Andreasen í seinna hálvleiki skeyt sítt 15. mál í endaspælinum.

Sum nevnt, so gjørdist dysturin eisini ein staðfesting av meistarheitinum hjá KÍ. Alt árið hava tær verið oddalið, og tó at tríggir dystir eru eftir at spæla, so er munurin longu nú somikið stórur, at tær verða ikki tiknar, og einasti spenningurin tykist vera, hvørt tað hesa ferð man eydnast teimum at vinna kappingina við fullum stigatali.

**GÍ-KÍ 0-3 (0-2)**
0-1: Elsa Maria Simonsen
0-2: Rannvá Andreasen (br.)
0-3: Rannvá Andreasen

HB-Skála 3-3 (2-2):

# Fyrsti javnleikurin

**Fyrsti javnleikurin í endaspælinum gjørdist veruleiki, tá Skála í seinastu løtu fekk bjargað øðrum stiginum í dystinum móti HB mikukvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Lítið er at ivast í, at HB, sum spakuliga tykist hava fótað sær við nýggja liðnum, var favorittur, tá tær á heimavølli tóku ímóti Skála. Ikki minst eftir sannførandi sigurin hjá havnarliðnum, tá tær spældu á Skála herfyri.

Hesa ferð megnaði Skála tó at geva HB munandni meira mótstøðu, og í evstu løtu fingu tær eisini løn fyri stríðið, tá tær fingu bjargað øðrum stiginum heim aftur við sær.

### Báðar vegir

Yvir høvur var tað soleiðis, at dysturin mikukvøldið gekk báðar vegir. HB var tó liðið, sum kom betri frá byrjan, tá Gunn Müller eftir málverjamistak fekk lagt HB á odda. Lítla løtu seinni seinni kundi Malan á Dunga økja um leiðsluna, tá hon og Vivian Unadóttir høvdu tagað Skála-verjuna sundur, og so kundi ein hildið, at hetta fór at líkjast eini endurtøku av trygga sigrinum inni á Skála.

Soleiðis gjørdist tó ikki. Skála gav ongan tíð skarvin yvir, og áðrenn farið varð til hálvleiks, høvdu tær togað seg upp á javnt við tveimum málum frá Elin Jacobsen.

Fyrst var hon ivaleyst, tá hon gjørdist einsamøll við málverjanum, og beint fyri hálvleik kundi hon rulla bóltin í tómt mál, eftir at Poula D. Olsen hevði rikið framvið málverjanum, og rulla flatt tvørtur um.

Í seinna hálvleiki lá tað leingi til, at tað hóast alt skuldi gerast HB, sum fekk stigini. Vivian Unadóttir gjørdi skjótt av, og eftir lítlari løtu í seinna hálvleiki hevði hon aftur lagt HB á odda, og fram til allar seinastu sekundini tóktist hetta gerast støðan.

Skála vildi tað tó øðrvísi, og í seinastu sekundunum varð javnleikurin veruleiki. Eitt høgt innlegg varð sent innfyri HB-málið. Bólturin tók í stólpan, og har var Anna Berg Danielsen fyrst á.

Hóast vónbrotið við javnleikinum, so er HB framvegis á triðja plássinum í landskappingini, men kappingin her er nú harðnað munandi. Ikki minst eftir sigurin hjá B68 á B36.

**HB-Skála 3-3 (2-2):**
1-0: Gunn Müller
2-0: Malan á Dunga
2-1: Elin Jacobsen
2-2: Elin Jacobsen
3-2: Vivian Unadóttir
3-3: Anna Berg Danielsen

Vikuskifti

Nr. 171 • leygardagur • 7. september 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## Lugarprát uppi á turrum

Gomlu lugarini eru ikki mong eftir og ein ávísur farri av nostalgi og hugna er kring lugarini, tá tey koma upp á tal. Og at finna eitt lugar uppi á landi er óivað sjáldsamt, men í Vági finst eitt slíkt

Lesið síðu 4 og 5





# Blómur – til eitt og hvørt endamál

**– Tá fólk koma á gátt hjá okkum og skulu brúka blómur, siga tey altíð, hvat tað er tey skulu brúka blómurnar til, sigur Karina Joensen, sum eigur og rekur Summardáan í Klaksvík**

SAMRØÐA/HUGLEIðING
*Ingrid Bjarnastein*

At geva blómur er nakað, sum gongur langt aftur í tíðina. Løgið er tað, hóast alt. Líkamikið, hvat er hent, so eru blómur altíð nakað, ið er ein hóskandi gáva. Eitt hóskandi tekin um, at nú velur onkur at gleðast við tær ella at nú syrgja tey við tær.

Blómur vekja ymsar kenslur í fólki. Tá talan er um eina brúðarvígslu, eru blómur nakað, ið súmbolisera kærleika. Blómandi kærleikan millum tvey, ið nú hava valt at gerast eitt. Um vit so hugsa um eina jarðarferð, so eru blómur tað givið verður fyri at vísa samkenslu. Og fáa blómurnar eina heilt aðra virkan enn tær fáa um tú hevði givið tær í samband við eina vígslu. Til eina jarðarferð verða blómurnar meira syrgnar. Tær vísa, at her er nakað, sum einaferð var lív, farið.

### Tilvitað

Blómuhandlar hava mestsum altíð nóg mikið at gera. Vit hava verið ein túr í Summardáanum í Klaksvík og fingið okkum eitt prát um blómur og blómugeving.

– Tá fólk koma á gátt hjá okkum og skulu brúka blómur, siga tey altíð, hvat tað er tey skulu brúka blómurnar til, sigur Karina Joensen, sum eigur og rekur Summardáan.

Og tá fólk fortelja, hvat blómurnar skulu nýtast til, so er altíð lætt at finna eina passaliga bukett, krans, urtapott ella hvat tað skal vera.

– Fólk eru ógvuliga tilvitað um, hvat tey skulu keypa. Tá fólk til dømis skulu keypa ein krans, so siga tey flestu, hvat tað er, tey vilja hava, greiðir Karina frá.

– Tað er onki ávíst blómuslag, ið verður nýtt til tey ymsu høvini. Allar blómur verða nýttar til alt. Tað verið seg kransar, bukettir og so víðari.

Fyrr var tað mest nelikar og krysantimum, sum varð brúkt. Hetta komst av, at hetta eru blómurnar, ið halda sær best og longst. Men nú tá ein fær blómur regluliga, so er hetta ikki nakar trupulleiki.

Eisini eru tað nógvir dreingir, ið koma innar í Summardáan at keypa unnustuni blómur. Fyri tað mesta er tað rósur, ið verða keyptar. Hetta heldur Karina kemst av, at rósur verða settar í samband við kærleika.

Men tá blómur verða keyptar til eina jarðarferð, sigur Karina, at hetta er heilt vist fyri at vísa samkenslu.

– Tá ein er til eina jarðarferð er alt so keðiligt og syrgiligt, og tá er tað eisini deiligt at hava okkurt vakurt at hyggja eftir – sum eitt nú blómur.

Blómur ávirka fólk á ein heilt serligan hátt. Øll verða glað tá tey fáa blómur.

– Blómur eru frískar og vakrar, og ein verður bara glaður tá tú fært blómur, sigur Karina Joensen at enda.